Tvey nýggj sersambond stovnsett

Talið av sersambondum innan ÍSF økist. Fyrst var tað fótbólturin, síðani fimleikurin og flogbólturin og nú eisini róðurin og hondbólturin.

Tvær afturat av deildunum innan ÍSF eru vorðnar sersambond. Tað eru Hondbóltsdeildin og Róðrardeildin, ið nú bera nøvnini Hondbóltssamband Føroya og Róðrarsamband Føroya.

Hondbóltssambandið

Hondbóltssambandið helt stovnandi aðalfund fyrrapartin leygardagin og vórðu starvsnevnd, kappingarnevnd og dómaranevnd valdar.

Sofus Rubeksen, ið hevur sitið sum formaður í Hondbóltsdeildini seinastu trý árini, ynskti ikki afturval.

Í starvsnevndina komu Jóannes Ziska, Klaksvík, Símun Jacobsen, Gøtu og Torbjørn Mikkelsen úr Havn.

Í kappingarnevndina komu Hans Holm, Havn, Agnes Lassen, Vági, og Jóannes Ziska, Klaksvík, meðan Heðin Mikkelsen, Hendrik Rubeksen og Torbjørn Mikkelsen, allir úr Havn, mynda dómaranevndina.

Róðrarsambandið

Eisini Róðrarsambandið helt stovnandi aðalfund leygardagin, har starvsnevnd, kappingarnevnd, róðrarøkis- og bátsnevnd og dómsnevnd vórðu valdar.

Í starvsnevndina varð Ísak Mikladal, Klaksvík, valdur formaður, Bjarni Berg, Skála, varaformaður, og Dánjal Joensen, Kvívík, skrivari, meðan Pidde Lamhauge úr Runavík varð valdur til eykamann.

Kappingarnevndin fekk Petur Jacobsen, Fuglafirði, sum formann, Steingrím Samuelsen, Havn, sum varaformann, og Magnus Magnussen, Kvívík varð skrivari, meðan Sarita Olsen varð tiltakslimur.

Í róðrarøkis- og bátsnevndina komu Frímund Sivertsen, Havn, sum formaður, Hjørleif Gaard, Oyndarfirði, varaformaður, og Eigil Hansen, Havn, sum skrivari, meðan Torleif Sigurðson, Klaksvík, Árni Absalonsen, Havn, og Sigvald Kristiansen, av Skála, komu í dómsnevnd Róðrarsambandsins.

Nú fara vit aftur at tippa

Nú byrja vit tippingina aftur her í blaðnum. Vit royndu hetta eisini í fjør, og tá fekk hetta tiltak góða undirtøku, og tí royna vit aftur í ár. Hvønn leygardag seta vit ein seðil í blaðið. Har á standa dystir, sum verða leiktir vikuskifti eftir. Tað verða hvørja ferð 12 dystir at tippa.

Vinningurin

Hóast henda tipping einki kemur at kosta teimum, sum luttaka, er møguleiki at vinna pengar í tippingini. Hevur tú einsamallur/møll 12 rætt, fært tú 250,- kr. Um tað eru fleiri, verður býtt. Hevur tú einsamallur/møll 11 rætt eru 200,- kr. tær vísar, og hevur tú 10 rætt, er vinningurin 150,- kr., um tú ert einsamallur/møll um at vinna.

Um eingin hevur annaðhvørt 12, 11 ella 10 rætt verður vinningurin tvífaldaður til vikuna eftir.

Hesaferð

Ætlanin er at hava dystir í 1., 2. og 3. deild til tippingardystir, men vikuskiftið 3. og 4. mai er avsett til landsliðsvenjing, og tí hava vit á hesum tippingarseðlinum bert dystir í dreingja-, smádreingja- og piltadeildini.

Góða eydnu!

Um tippað verður, at heimaliðið (fyrst nevnda liðið) vinnur, skal setast eitt 1-tal í raðið undir »1«. Um tippað verður javnleikur, skal eitt X setast í raðið undir »X«. Um tippað verður, at útiliðið (aftara liðið) sigrar, skal setast eitt 2-tal í raðið undir »2«.

Bert eitt tekin kann setast út fyri hvønn dystin.

Um tekin verður sett í skeivt rað, er seðilin ógildigur. Setast skulu bert 1-tal í »1-raðið«, bert X í »X-raðið« og 2-tal í »2-raðið«.

Bæði tipsrøðini mega verða eins útfylt. Raðið til høgru er eftiransingarrað tygara, soleiðis at tygum síggja, hvussu innsenda raðið varð útfylt.

Tippingarseðilin verður at senda til: **sosialin,** postrúm 76, 3800 Tórshavn, og skal hann vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin áðrenn leikdagarnar.

Navn:

Bústaður:

1

Hetta er eftiransingarseðil tygara

Leikdagar: 3. og 4. mai

DYSTIR		1	X	2	1	X	2
B36b—GÍ	dr.						
TB—AB	dr.						
VB—HBb	dr.						
KÍ—B71	dr.						
Royn—TB	sd.						
KÍ—HBa	sm.						
Streymur—SÍ	sm.						
B68—ABa	sm.						
Sumba—VBa	pilt.						
B36b—NSÍb	pilt.						
MBa—HBd	pilt.						
AB—SÍF	pilt.						

Fótbóltur um vikuskiftið

26. apríl
2. deild
81 HB—NSÍ
82 B68—Royn
83 TB—Fram

3. deild
84 SÍF—B71
85 B68—SÍF
86 KÍ—Sumba
87 Skála—B36

Ísafjarðarsúlan
1. umfar 4. deild
88 EB—KÍ 4
89 NSÍ—AB 5
90 B68—ÍF 6
91 MB—Skála 7
92 B36a—SÍ 8
93 SÍF-Streymur 9
94 1—TB 10
95 2—3 11

Unglingad.
97 NSÍ—VB

Dreingjad.
Steypakapping
innl. umfar.
98 HBa—ÍF 1
99 Skála—GÍ 2
100 B71—B36a 3
101 TB—SÍF 4
102 VB-Streymur 5
103 AB—B36b 6
104 HBb—NSÍ 7
105 KÍ—B68 8

Smádreingjad.
106 Sumba—VB
107 HBb—Royn
108 B36a—TB
109 EB—KÍ
110 LÍF—Skála
111 NSÍb—HBa
112 MB—ABb
113 Streymur-SÍF
114 ABa—HBc
115 ÍFb—B68
116 NSÍa—B71

Piltad.
117 TBb—Royn
118 TBc—Sumba
119 VBa—VBb
120 LÍF—KÍa
121 ÍF—HBa
122 B36—LÍF
123 MBa—AB
124 Sí—MBb
125 Streymur-SÍF
126 HBc—Skála
127 NSÍ—B71
128 KÍb—HBb
129 B68—B36a

27. apríl
1. deild
130 VB—GÍ
131 ÍF—HB
132 KÍ—MB
133 B36—TB

2. deild
134 SÍ—EB

Unglingad.
135 AB—TB
136 KÍ—MB
137 ÍF—HB

dagbókin

Læknavaktirnar

Tórshavn: Andor Ellefsen, tlf. 12233
Eysturoyggin: Sverri Lamhauge, tlf. 48016
Norðoyggjar: Steingrímur Weihe, tlf. 55300
Suðuroyggin: Tlf. 71560

Tannlæknavaktin, Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst í dag kl. 13—14 á tlf. 14544.

Gudstænastur

Havnar kirkja: Hans J. Joensen, altargongd
Vesturkirkjan: Ejvind Vilhelm
Argir: Høgni Poulsen
Kaldbak: Axel Tórgarð, altargongd
Vestmanna: Jákup Magnussen
Tjørnuvík: Petur Petersen, altargongd
Skáli: Petur M. Rasmussen, altargongd
Fuglafjørður: Torkil Beder, altargongd
Klaksvík: Niels P. Danielsen
Hvannasund: Salomon J. Joensen, altargongd
Mykines (ella Miðvágur): David Johannesen
Skopun: Bergur Jacobsen, altargongd og konfirmatión
Hvalba: Elsa Funding, talvan gongur fyri Sunnudagsblaðið
Øravík: Johan Weihe kl. 18, altargongd
Tvøroyri: Johan Weihe kl. 11, altargongd (kirkjutíðin er broytt til kl. 11)
Vágur: Bjarni Bæk
Hov: Bjarni Bæk kl. 19
Leiti: Elsa Funding, kl. 17 altargongd

Norea Radio Danmark

Millumbylgja 205 m (1466 kHz) kl. 21.15—21.30.

Mánadagin 28.: »Snarið 04-527190 — ella skrivið til Norea Radio, 6100 Haderslev!«

Spurningar og sangynski frá lurtarunum. Poul Lykke Nielsen og Jens Erik Rasmussen.

Týsdagin 29.: »Den søgende!« Fyrsti partur av bíbliuskúla hjá Knud Larsen, Hillerød.

Hmnos og Hillerød Ungdomskor syngja.

Norskar sendingar eru hvønn dag kl. 16.05 á stuttbylgju 31 m (9,6 mHz) og kl. 17.05 á stuttbylgju 25 m (11,8 mHz).

Støt Viljen

Losjan Støt Viljen hevur fund í Uppistovu mánadagin kl. 20.

Evangeliska røddin

hoyrist hvørt mánakvøld kl. 22.30 á føroyskum frá Monte Carlo, millumbylgju 205 m (1466 mHz).

Orð krossins

Sending á íslendskum. Hoyrist hvørt mánakvøld kl. 23.15 frá Monte Carlo á millumbylgju 205 m (1466 kHz).

nýtt um nøvn

Nýggjur landslækni

Hennara Háting Drotningin hevur sett Høgna Debes Joensen til landslækna eftir tilmæli frá innanrikismálaráðharranum.

Høgni Debes Joensen, sum er sonur fráfarna landslæknan, Hans Debes Joensen, tók læknaprógv í 1969 og fekk autorisatión sum serlækni í húð- og kynssjúkum í 1976.

Hann hevur starvast á landsjúkrahúsinum, 1969—71, og sum kommunulækni á Sandi, 1971—72. Seinastu trý árini hevur hann starvast sum serlækni í Havn.

Nýggj nevnd

Føroya Handverkslærlingafelag hevði aðalfund í síðstu viku.

Úr nevndini í deildini í Havn fóru John Müller, Liv Ejdesgaard og Sigmar Hansen. Í nevndina komu Jens Reinert, Edvard Olsen og Svenning Poulsen.

Nevndin, sum skipar seg sjálv, hevur valt Oswald Joensen til formann, Jens Reinert til 2. formann, Suna Skarðhamar til skrivara, Steffan Egholm til 2. skrivar og Edvard Olsen til 2. kassameistara. Tiltakslimur er Zakarias Frýdal.

Lýsið í sosialinum